Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Tórshavn, 22.02.2024

Viðmerkingar frá Visit Faroe Islands til ferðavinnulógina

Yvirskipaðar viðmerkingar

Visit Faroe Islands fegnast um, at landsstýrið nú hevur í hyggju at seta í verk ferðavinnulóggávu, ið skapar greiðari karmar um ferðavinnuvirksemið í Føroyum.

Vit hava í fleiri ár víst á, hvussu átrokandi tað er fyri at menna eina burðardygga framtíðar ferðavinnu í Føroyum, at vit hava eina munagóða náttúruumsiting og at vit tryggja øllum eina lætta og rímiliga atgongd til okkara náttúru, sjálvsagt undir ábyrgd og við avmarkingum. Fyrsta stigið er tikið við náttúruverndarlógini, ið vit fegnast um og sum vit vóna verður eitt virkið amboð til at skipa útvald øki við serligum verndarátøkum.

Serliga hevur tað tó verið málið um atgongdina til okkara náttúru, ið hevur fylt nógv hesi seinastu árini. Vit hava áhaldandi víst á, at galdandi jarðarlóggáva als ikki er nøktandi lógarkarmur og hvussu stórur tørvur tað er á nýggjum skipanum, ið greitt áseta treytir og rættindi fyri frítíðarvirksemi í haganum. Í dag ræður tilvildin fullkomiliga í náttúruni og ógreiða rættarstøðan hevur m.a. havt við sær, at vit síggja gjaldsstøðir, avmarkingar og treytir, ið hava neiliga ávirkan á ferðavinnuna og okkara umdømi sum vertir og ferðafólkaland. Ferðafólk verða kravd eftir t.d. 2-500 kr. fyri at ganga lutfalsliga stuttar túrar, oftani uttan tænastuveiting og uttan at íløgur eru gjørdar í hentleikar. Gjaldsumsitingin er eisini tilvildarlig, m.a. tí tað er ikki greitt, hvør verður roknaður sum føroyingur og hvør er at rokna sum útlendingur. Tað er als ikki ikki haldbart, at teir 477 hagarnir hvør í sínum lagi kunnu seta upp gjaldsportur ella treytir sum kunnu broytast frá degi til dags. Vit fara ongantíð at fáa eina skipaða og burðardygga ferðavinnu við støðuni, sum er galdandi í dag. Spurningurin er um vit í heila tikið hava eina ferðavinnu um nøkur ár, um ikki politiski myndugleikin skipar økið í eini tíðarhóskandi lóggávu, sum allir partar kunnu hava álit á.

Greiðir vinnuligir karmar at virka undir er fortreytin fyri framhaldandi menning, tað er fortreytin fyri skipanum, sum eru álítandi, tryggar og gjøgnumskygdar og tað er fortreytin fyri eini ábyrgdarfullari og burðardyggari vinnu. Hesar karmar hevur ferðavinnan ikki í dag.

Verandi skipan ger tað nærum ómøguligt at veita kundunum, ferðafólkunum, sum koma at vitja í Føroyum, eina nøktandi kunning orsaka av ógreiðu viðurskiftunum og óvissuni um, hvat er galdandi. Tað er fullkomiliga óhaldbart fyri eina vinnu í menning, at tað ikki ber til at planleggja inn í framtíðina. Tað bremsar íløgum, tað skapar stríð og tað er í ferð við at oyðileggja okkara umdømi. Og missa vit umdømið, so er torført at venda gongdini og at standa seg í kappingini um ferðafólkini. Vit síggja tekin um, at tað møguliga longu er í ferð við at henda. Tað er tí í tøkum tíma, at nakað verður gjørt á hesum økinum.

Yvirskipað meta vit at uppskotið til ferðavinnulóg er eitt stórt stig rætta vegin móti eini burðardyggari og betri skipaðari ferðavinnu. Vit taka fult undir við endamálsorðingini í §1 um eina burðardygga ferðavinnu. Vit skulu altíð stremba ímóti at finna javnvágina millum umhvørvið, vinnuna, upplivingina

hjá gestunum og at fólkini á staðnum trívast. Lógin er eitt týdningarmikið og avgerandi fyrsta stig rætta vegin, tó at tað er greitt, at hendan lógin aleina ikki fer at hava við sær, at vit fáa eina burðardygga ferðavinnu. Ein burðardygg ferðavinna í javnvág krevur, at vit seta inn á fleiri ymiskum økjum, ikki minst við eini virknari náttúruumsiting.

Frælsið at flyta seg og rætturin at njóta náttúruna

Lógaruppskotið tryggjar almenninginum grundleggjandi og sjálvsøgd rættindi, nevniliga rættin til at njóta náttúruna og frælsi at flyta seg frítt í Føroyum undir rímiligum treytum og avmarkingum. Í dag hevur almenningurin ikki nakað lógartryggjað flytifrælsi og fleiri dømi eru eisini um, at føroyingar við støði í galdandi jarðarlóggávu verða meldaðir fyri ófráboðaða gongd í haganum og eru álagdir gongugjøld fyri ávísar túrar. Verandi støða hevur havt við sær, at fólk í dag hava ein ampa á sær, tá tey fara ein hagatúr.

Endamálið við galdandi jarðarlóggáva, ið tekur støði í siðbundnum landbúnaði, er í fyrstu atløgu at verja og tryggja rættindini hjá jarðareigarunum og í øðrum lagi at avmarka rættindini hjá almenninginum.

Vit viðurkenna, at seyðahald er tætt knýtt at føroyska samleikanum og er framvegis ein týdningarmikil mentunarberi, ið vit eiga at hjúkla um. Eisini fyri ferðavinnuna, tí hetta er partur av tí, sum eyðkennir land okkara og sum ger, at ferðandi vilja síggja og uppliva okkara mentan, mat og náttúru. Men tíðirnar eru nógv broyttar, síðani galdandi lóggáva varð fest á pappír. Tørvurin er í dag ein heilt annar og tað er neyðugt at lata upp fyri meiri fjølbroyttum virksemi í náttúruni. Fólk eiga at hava lætta og rímiliga atgongd til náttúruna tí tað er ein fortreyt fyri trivnaði í Føroyum og tað er týðandi fyri fólkaheilsuna, ítrivi og upplivingum. Tað er ikki longur tíðarhóskandi, at tað einans er við loyvi frá einstaklingum sum eiga ella umsita jørð, at fólk t.d. kunnu ganga sær ein túr.

Ferðavinna og siðbundið seyðahald eru ikki í andsøgn, tvørturímóti er ferðavinnan ein sera góður og upplagdur møguleiki hjá landbúnaðinum at virðisøkja sítt virksemi, ið vit eisini síggja nógv dømi um. Og tað ber sjálvandi væl til at hava seyðahald og ferðavinnu á sama øki.

Lógaruppskotið nemur við rættindi, ið eru so grundleggjandi og prinsipiell, at tey áttu at verið skipað aðrastaðni enn í eini ferðavinnulóg. Heilt yvirskipað metir Visit Faroe Islands tí, at spurningurin um atgongdina til náttúruna og spurningurin um avgjøld og umsiting innan náttúru- og ferðavinnu áttu at verið skild sundur og skipað í hvør síni lóg.

Tá hetta er sagt, so er tað altavgerandi, at almenningurin verður tryggjaður eina lætta og rímiliga atgongd til náttúruna. Tað, sum er størsta styrkin við hesum lógaruppskoti er, at nettupp hesi grundleggjandi rættindi loksins verða tryggjað í lóg. Tað er veruliga eitt frambrot.

Náttúruvernd, slit og óskipað ferðsla

Visit Faroe Islands metir tað vera av alstórum týdningi og ein sjálvfylgja, at vit verja okkara náttúru. Ein vøkur og óskalað náttúra er sjálvt grundarlagið undir ferðavinnuni. Uml. 90 % av øllum ferðafólkum koma hendan vegin orsaka av náttúruni og verður hon ikki vard, er vandi fyri at grundarlagið undir ferðavinnuni eisini hvørvur.

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Náttúruvernd og ferðavinna ganga hond í hond. Ferðavinnan hevur havt við sær, at vit í størri mun eru farin at virða náttúruna fyri vakurleikan og at vit, ofta við hjálp frá gestsins eyga, duga betri at virðismeta okkara náttúru. Vit meta ikki at tað er av tilvild, at prátið um náttúruvernd í Føroyum av álvara hevur vundið uppá seg, samstundis sum ferðavinnan hevur tikið seg upp.

Virðing fyri náttúruni kemur ikki av sær sjálvum. Fortreytin fyri at vit virða náttúruna er, at vit hava vitan um hana. Og fortreytin fyri vitan er atgongd. Vit skulu verja sárbæru støðini og vit skulu leiða ferðafólk burtur frá fuglaríkum økjum og tað ber væl til at gera tað við skelting, kunning, gøtum og greiðari uppmerking.

Ferðavinnan kann hava neiligar avleiðingar fyri náttúruna og vit síggja í dag dømi um gonguræsir sum eru vorðnar runutar av gongusliti. Tað er ein sannroynd, at føroyska náttúran er sárbær og frammanundan sera slitin av nógva seyðabitinum. Tá svørðurin slítist uppaftur meiri, tað verði seg av ATV-sporum, rossasporum ella gongufólki, er tað nógva vætan, ið er størsti fíggindin og sum ger støðuna alsamt verri sum frá líður. Tað jaliga við hesum lógaruppskotinum er, at tað nú verður staðfest ein myndugleikaábyrgd og at lógaruppskotið samstundis útvegar neyðugu fíggingina til at gera gøtur, so vit kunnu bøta um slit og leggja nýggjar gøtur, har tað er neyðugt. Tað er nevniliga soleiðis, at tað bara eru best umtóktu náttúruperlurnar, sum líða undir sliti frá gongufólki. Tað jaliga er tó, at avbjóðingin er lokal og at tað í flestu førum er talan um lutfalsliga stutt strekki, har tað ikki krevst so nógv at gera eina hóskandi gøtu, sum hevði loyst avbjóðingina.

Lógaruppskotið letur upp fyri, at vit loksins kunnu koma í gongd við at gera hesar neyðugu gonguræsirnar, ið eru neyðugt undirstøðukervi hjá ferðavinnuni og øðrum frítíðarvirksemi. Tað jaliga er eisini, at vit við ferðafólkateljarunum og skipanini, ið skrásetir gps-data frá fartelefonum vita, at gongufólk stórt sæð bara ganga eftir uppmerktum leiðum, ið eru at finna á m.a. bygdagøtur.fo og á teimum væl umtóktu støðunum (sum t.d. Klakkur, Slættaratindur, Kallurin, Trælanípa osv.). Tað er ein myta, at ferðafólk ganga óskipað allastaðni. Tað kemur sjálvandi fyri, at einstøk ferðafólk reika frítt, men hetta er veruliga undantakið og vit meta als ikki at nakar vandi er fyri "náttúruoyðing" ella "hópferðavinnu" við samtykkja hetta lógaruppskotið. Tvørturímóti letur hetta lógaruppskotið upp fyri, at vit nú hava møguleika fyri at seta inn við greiðum skipanum og fleiri uppmerktum leiðum í náttúruni, sum fara at hava við sær betri náttúruvernd; nakað sum verandi skipan als ikki megnar.

Í dag er støðan soleiðis, at fleiri krevja gongugjøld fyri at fáa fígging til vega fyri eina gøtu. Fólk skulu við øðrum orðum rinda gongugjald fyri eina íløgu sum (møguliga) verður gjørd í framtíðini. Vanligi vinnuligi leisturin um at krevja "tænastu"-gjøld, eftir at ein íløga er gjørd er altso ikki neyðturviliga galdandi tá tá tað snýr seg um gjaldsportrini. Fleiri jarðareigarar vilja treyðugt lata almennar stovnar ella grunnar fíggja gøtugerð, tí treytin tá vanliga er, at peningurin fer til almannagagnligt endamál og at tað ikki er ein íløga, ið skal forrentast via eitt gongugjald. VFI hevur í fleiri umførum víst á bæði loysnir og fígging til at gera gøtur á mest útsettu økjunum, men ofta verður hetta ikki veruleiki, tí bøndur aftra seg við at taka av møguleikanum um tað samstundis inniber skerdar møguleikar fyri at krevja gongugjald. Peningastovnar vilja heldur ikki lata fígging til slíkar íløgur, tí støðan er so óviss og ongin veit, hvørjar treytirnar vera í framtíðina. Verandi skipan hevur við øðrum orðum havt við sær eina fastlæsta støðu, har ongin kemur víðari og einasti útvegur fyri bøndur kann tá vera at krevja gongugjøld.

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Lógaruppskotið loysir upp hesa støðu og ger tað møguligt hjá almennum myndugleikum og ymiskum grunnum at taka um endan og tryggja, at neyðugu gøturnar verða gjørdar.

Ítøkiligar viðmerkingar til lógaruppskotið

Visit Faroe Islands tekur undir við grundtankanum og endamálinum við lógaruppskotinum. Vit hava tó nøkur uppskot til tillagingar, sum vit meta høvdu styrkt uppskotið.

Til § 4:

Mælt verður til at strika § 4, stk. 4. Ynskir landið at seta forboð fyri, at fólk fara í hagan við hundi, so er hetta ein áseting, ið einamest er grundað á landbúnaðarvirksemi og sum bara er galdandi fyri føroyingar, tí ferðafólk koma ikki til landið við hundi. Hetta hevur sostatt onki við ferðavinnu at gera og eigur framhaldandi at vera regulerað í landbúnaðarlóggávuni og ikki í eini ferðavinnulóg.

Til § 5:

Ongin áseting er í lógini, sum staðfestir, at bygdagøturnar varðveita sína støðu sum almennar farleiðir. § 41 í girðingarlógini, ið tryggjar øllum rætt at ferðast eftir bygdagøtum uttan loyvi, verður sett úr gildi uttan at samsvarandi áseting er tryggjað í hesi lóg. Tó geva almennu viðmerkingarnar ábending um, at bygdagøturnar verða verandi almennar. Mælt verður til at áseta greitt í lógartekstin, at bygdagøturnar framhaldandi vera almennar og at hesar leiðir ikki eru fevndar av § 5 um at gera standardavtalu.

Tað er gott at lógin leggur upp til samstarv millum vinnuligar veitarar og jarðareigarar. Tað kann tó vísa seg at hava óynsktar avleiðingar fyri tað, vit vanliga rópa skipaða ferðavinnu við ferðaleiðara, um tað verður soleiðis, at veitarar vera álagdir krav um at gera standardavtalu í øllum høgum, har tey hava sítt virksemi. Tað veldst sjálvandi um, hvørji krøvini vera í hesum standardavtalum, hvussu smidligt samskiftið og umsitingin kring hesar avtalur verður og um ein slík avtala eisini fer at fevna um eitt gongugjald. Tað er ikki heilt greitt í lógini. Óhepna avleiðingin kann vera, at ferðaleiðarar og ferðasmiðir gevast við at gera fyriskipaðar túrar í náttúruni, tí tað verður teimum ov tvørligt og ósmidligt at skipa sítt virksemi. Tað er t.d. vanligt at gongutúrar ganga um fleiri hagamørk og tað er eisini vanligt, at túrar verða broyttir ella fluttir í seinastu løtu orsaka av veðri.

Handilslig ferðavinna, soleiðis sum hon er skilmarkað í lógini, fevnir eisini um føroyskar bólkar, ið fara gongutúrar við ferðaleiðara (t.d. eitt arbeiðspláss á summarútferð). Ásetingin letur upp fyri, at tað eisini í hesum førum kann verða kravt standardavtala við serligum treytum, sum vit ikki kenna í dag, herundir um gongugjald verður partur av standardavtalunum.

Tað er ikki skilligt, hví slík krøv skulu setast, tá talan er um fyriskipaðan túr við ferðaleiðara, tí møguligt órógv á fjallgongu ella annað virksemi í haganum, sum víst er á í almennu viðmerkingunum, er tað sama um tað eru 5 einstaklingar, sum fara sær ein túr ella um tað eru 5 við einum ferðaleiðara sum fara sær ein túr. Um nakað, so er møguleikin fyri órógvi størri, tá fólk ikki brúka ein ferðaleiðara, sum kennir staðbundin viðurskifti.

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Vit mæla til at broyta hesa áseting, soleiðis at vinnuligir veitarar sum útgangsstøði kunnu virka á jøvnum føti við øll onnur, men at ásetingin í § 5 letur upp fyri, at jarðareigarar *í serligum førum* kunnu krevja eina standardavtalu, sum skipar hetta virksemið har tað er neyðugt. Alternativt, at lógin greitt ásetir, hvørjar treytir skulu vera loknar fyri at kunna seta fram krav um standardavtalu. Tað er bara á væl umtóktu støðunum, at fleiri ferðasmiðir hava nógvar fyriskipaðar túrar. Tað er natúrligt at tryggja viðurskiftini í hesum høgum við formligum standardavtalum, sum tryggja øllum pørtum skipað viðurskifti. Eisini mæla vit til at tað kemur greiðari fram, um slíkar standardavtalur kunnu fevna um gongugjøld ella ikki.

Til §§ 6 og 14 :
At tryggja eina lokalt kjølfesta og sosialt burðardygga ferðavinnu er sjálvsagt av stórum týdningi. Sum útgangsstøði kann tað tí eisini vera ein fyrimunur, at kommunurnar orða hvør sína ferðavinnuætlan, ið síðani skal vera grundarlag fyri, hvussu ferðavinnan skal skipast á staðnum. Tað jaliga er eisini, at ein greið myndugleikaábyrgd verður staðfest innan lokala ferðavinnumenning.
Trupulleikin við hesum er tó, at vit hava 29 kommunur í Føroyum, harav fleiri teirra hava avmarkaða fyrisitingarliga orku. Tað er tí ivasamt, um allar kommunur fara at liva upp til hesa áseting og treytirnar í stk., pkt. 1-6. Ferðavinnan í Føroyum er framvegis sera avmarkað og tað er ein stórur partur av kommununum í Føroyum, sum stórt sæð ikki hava nakra ferðavinnu. Tí ber eisini til at seta spurnartekin við, hvussu viðkomandi tað er, at allar kommunur greina og lýsa ferðavinnuvirksemið og gera ætlanir fyri, hvussu vinnan skal mennast lokalt.

Ferðavinnan verður ikki skipað eftir kommunu- ella hagamarki. Vit hava eitt land sum er knýtt væl saman við vegum og tunlum. Tað ber t.d. lættliga til at vitja Gásadal, Saksun, Eiði og Viðareiði sama dag. Ferðavinnumenning í Føroyum snýr seg tí eisini í stóran mun at hugsað øðrvísi um Føroyar enn vit kanska eru von við. Kommunumørkini eru púra óviðkomandi og vit eiga at fyrireika Føroyar til at vera eitt samanhangandi og væl skipað ferðamál. Vit eiga at leggja til rættis við støði í heildini og ikki við støði í haga- og kommunumørkum.

Visit Faroe Islands metir tí, at tað hevði verið eini skilabetri loysn um land og kommunur í staðin gera eina landsfevnandi ferðavinnuætlan, har vit við eini miðvísari strategi menna undirstøðukervið (gøtur, útsýnisstøð, wc, vegir, parkering, skelting v.m.) har tað er neyðugt. Vit meta ikki, tað er skilagott at spjaða átøkini og inntøkurnar frá náttúrugjaldinum út á allar kommunur, bygdir og hagar. Ferðavinnuætlanir kunnu sjálvandi vera gott grundarlag undir landsfevnandi ætlanini og raðfestingunum, men vit meta ikki, at tær eiga at vera stýrandi.

Skotið verður upp, at skipað verður ein faklig nevnd við umboðum fyri land og kommunur, ið við støði í kommunalu ferðavinnuætlanunum, eini fakligari tørvsmeting og eini landsfevnandi menningarætlan letur landsstýrismanninum tilmæli um, hvussu inntøkurnar frá einum náttúrugjaldi eiga at verða brúktar.

Tað sum eisini er avgerandi í hesum sambandi er, at vit heldur enn at spjaða bæði vitan og inntøkur/útreiðslur, heldur royna at savna serkunnleikan og førleikarnar, soleiðis at vit sum frá líður hava eina sterka fakliga eind, ið hevur neyðugu førleikarnar og fíggingina til at gera hagagøtur, útsýnisstøð og mangt annað. Hetta hevði tryggjað, at vit ikki gera óneyðug inntriv í náttúruna, at gøtur o.a. fylgja einum høgum standardi og burðardyggum prinsippum um gøtugerð, og tað hevði í størri mun

tryggja, at vit seta inn meiri miðvíst og eftir eini landsfevnandi ætlan, ið hevði komi ferðavinnuni, náttúruni og teimum lokalu til góðar.

Til § 7:
Tað er eisini jaligt og í tráð við tankarnar um eina burðardygga og lokalt kjølfesta ferðavinnu, at heimafólk verða tikin við uppá ráð. Eisini í hesum føri ber tó til at seta spurnartekin við, um tað er ynskiligt ella neyðugt at allar bygdir í Føroyum skulu hava eina ferðavinnunevnd. Sum útgangsstøði meta vit, at tað heldur eigur at vera tørvurin sum stýrir, hvussu ein skipar seg í mun til ferðavinnuspurningar. Í summum bygdum er hóskandi og neyðugt at seta eina staðbundna ferðavinnunevnd, men nógvastaðni er tað hvørki viðkomandi ella ynskiligt. Tað er avgerandi at bæði land og kommunur hava tætt samskifti og ráðføra seg við heimafólki, men tað eigur tó at vera staðbundni tørvurin, ið avger, júst hvussu hendan ráðførslan fer fram og eigur tað at vera kommunali myndugleikin sum avger, hvussu hetta verður lagt til rættis.
Mælt verður frá at oyramerkja ein fjórðing av inntøkuni frá náttúrugjaldinum til hetta nevndararbeiði. Vit metta hetta vera óneyðug umsiting, sum bara í útvaldum førum kann vera ein ágóði fyri eina betri skipaða ferðavinnu. Heldur eigur peningurin at verða brúktur meiri miðvíst og har tørvur er at seta inn.

Til §8:
Tað er jaligt, at tað greitt verður ásett, at kommunurnar hava skylduna at halda bygdagøturnar og at skipa ferðsluna uttangarðs saman við m.a. jarðareigarunum.

Ásetingin áleggur eisini kommunum at gera nýggjar farleiðir uttangarðs. Sum nevnt er avgerandi fyri framhaldandi ferðavinnumenning, at vit fáa eitt hóskandi gøtukervi uttangarðs. Tað er fortreytin fyri væl skipaðari hagagongd og vernd. Tað er somuleiðis avgerandi, at vit ikki gera óneyðug inntriv í náttúruna. Íløgur eiga ikki at vera gjørdar í nýggjar gøtur uttan so at tørvur er á tí. Í nógvum førum er nóg mikið at merkja upp eina farleið og síðani at bøta um slit á útvaldum gøtustrekkjum, ið t.d. verða slitin orsaka av vætu. Veruligar gøtur eiga vit ikki at gera, fyrr enn tørvur er á tí. Tað er tí týdningarmikið, at kunngerðarheimildin í §8, stk. 2. verður brúkt, soleiðis at vit fáa greiðar reglur og mannagondir, áðrenn arbeiðið at gera nýggjar gøtur verður sett í gongd.

Tað er somuleiðis avgerandi, at nýggjar farleiðir verða lagdar við støði í sakligum og objektivum metingum.

Til § 13:
Visit Faroe Islands tekur fult undir við, at sett verður í verk eitt náttúrugjald. Tað er eisini jaligt og sera neyðugt, at gjaldið fevnir um cruise-ferðavinnuna.

Vit hava í fleiri ár víst á, at vit eiga at seta í verk eitt náttúruverndargjald, ið eigur at vera oyramerkt til náttúruvernd. Tað veri seg skrásetingararbeiði, árinsmetingar og at skipa nýggj verndarøki sbrt. nýggju

náttúruverndarlógini. Eisini eigur inntøkan at fara til at leggja góðar hagagøtur úr lokalum tilfari, ið fella væl í lendið, soleiðis at vit sum frálíður fáa eitt væl útbygt gøtukervi í fjøllunum.

Tað er skilagott at krevja gjaldið inn við komu til landið, so vit tryggja okkum at øll rinda hetta gjald uttan at neyðugt er at seta í verk serliga umsiting ella eftirlit. Tað verður tó ein teknisk og praktisk avbjóðing at fáa eina skipan at virka, tá munur skal gerast á fólki. §13, stk. 1 ásetir at tað bara eru ferðafólk eldri enn 16 sum rinda. Hvør verður roknaður sum ferðafólk er ikki útgreinað í lógini. Tað er sjálvsagt neyðugt at hetta verður greitt skilmarkað í lógini.

Visit Faroe Islands mælir til, at gjaldið verður álagt øllum ferðandi, eins og verandi ferðaavgjald. Tað er einasti háttur at tryggja eina rættvísa, gjøgnumskygda og effektiva skipan. Til ber at kalla gjaldið eitt umhvørvisgjald, ið er knýtt at atferðini og umhvørvisliga útlátinum hjá hinum einstaka. Hetta hevði havt við sær 1) at vit hava eina effektiva skipan uttan umsiting ella eftirlit, 2) at vit kunnu leggja gjaldið á eitt lægri støði, tá øll rinda og 3) at vit sleppa undan óhepnum støðum og truplu uppgávuni at skilmarka, hvør er fevndur av gjaldinum og hvør er ikki.

Um politiska ynskið er at seta í verk ein ferðavinnuskatt, ið bara skal fevna um útlendsk ferðafólk, so ber til at seta í verk eina smidliga endurgjaldsskipan fyri føroyingar eins og tey hava gjørt í t.d. Svalbard, so føroyingar, ið flúgva við útlendskum flogfeløgum, kunnu fáa náttúrugjaldið endurgoldið. Tað ber til at avmarka talið av føroyingum, sum skulu søkja um endurgjald við at brúka loysnirnar við talgilda samleikanum á keypssíðunum hjá Atlantic Airways og Smyril Line, soleiðis at føroyingar við eini einfaldari innritan keypa ferðaseðlar uttan avgjald. Nógv størsti parturin av føroyingunum, sum í dag flúgva av landinum, eru kundar hjá Atlantsflog.

Tað er eisini møguligt at leggja avgjaldið á gisting, ið hevur tann fyrimun, at tað er ein kend skipan úr øðrum londum og at tað meiri sannlíkt rakar tey, sum ganga hagatúrar. Vansin er 1) at tað fer at krevja stóra umsiting at fáa gjaldið inn frá øllum veitarum, 2) tað er ógreitt, hvussu gjaldið kann krevjast inn frá privatari útleigan og cruise, 3) føroyingar verða sannlíkt fevndir av avgjaldinum og 4) vit revsa tey ferðafólk, sum vit helst vilja lokka til Føroyar, t.e. tey sum steðga longi og leggja mest eftir sær. Tað verður við øðrum orðum trupult at fáa somu inntøku við hesum leisti uttan so at avgjaldið verður munandi hægri enn í øðrum londum og so mikið høgt, at vandi er fyri at tað verður kappingaravlagandi, m.a. eisini tí okkara grannalond ikki hava gistiskatt.

Einhvør skipan, ið ger mun á fólki við støði í bústaði, tjóðskapi ella øðrum samleikaeyðkennum er óheppin og verður sera trupul at seta í verk og at umsita. Tað veri seg um gjaldið verður kravt inn sum avgjald á ferðaseðilin, sum náttúrupass ella sum gistingarskattur.

Til §14:
Ein nýggjur ferðavinnuskattur er ein gyltur møguleiki at seta inn miðvíst við menningarátøkum og verndarátøkum sum kunnu tryggja náttúruvernd og eina burðardygga og væl skipaða ferðavinnu. Vit meta ikki, at útgjaldsleisturin sum hetta uppskotið leggur upp til, fer at røkka tí endamálinum. Orsøkin er sum nevnt, at peningurin verður býttur út á kommunur, bygdir og til jarðareigarar uttan nakra miðvísa ætlan. Vandin er, at vit petta sundur eina lutfalsliga stóra pulju, soleiðis at øll fáa eitt sindur, men at tað

verður so smábýtt, at ongin fer at merkja stórvegis ágóða av inntøkuni. Eisini er tað heldur ógreitt, hvussu peningurin kann nýtast. Kommunurnar, sum fáa helvtina av inntøkuni kunnu sambært viðmerkingunum brúka part av inntøkuni til m.a. bjargingarlið og sløkkilið.

Bygdir og jarðareigarar fáa hina helvtina av inntøkuni, bøndurnir fullkomuliga uttan treytir og bygdir til "átøk og trivnað" á staðnum. Hví ein nýggjur ferðavinnuskattur skal lutast út á hendan hátt er ikki skilligt og lógaruppskotið ger heldur ikki nakra roynd at greiða frá, hvørji atlit liggja aftanfyri júst hesum býtislyklinum og hvussu eftirlit við peninganýtsluni verður framt.

Mælt verður til at tillaga ásetingina, soleiðis at vit tryggja okkum, at inntøkan frá náttúrugjaldinum verður brúkt meiri miðvíst til oyramerkt menningarátøk (serliga gøtur) um alt landið og til náttúruvernd. Vit meta at eitt "náttúrugjald" sum útgangsstøði eigur at fara til náttúruna.

Tað er skilagott í fyrstu atløgu at brúka peningin til at leggja góðar hagagøtur, har slit er at síggja og har nógv vitja á hvørjum ári. Tað er eisini skilagott at brúka part av inntøkuni til betri skipaði viðurskifti á mest útsettu smáplássunum. Sum frá líður er tað tó ikki skilagott at brúka ein býtislykil, sum áhaldandi tryggjar teimum sum fáa flest ferðafólk, stóran part av inntøkuni. Ein partur av ferðagjaldinum eigur eisini at fara til at menna nýggj støð við neyðugum hentleikum og møguleikum, soleiðis at vit kunnu spjaða ferðavinnuna um alt landið, tryggja at fleiri fáa ágóðan av møguleikunum ferðavinnan hevur við sær og at vit avlasta tey støð, sum fáa flest vitjandi.

At enda hevði tað, sum nevnt eisini verið ynskiligt, at uppgávan at leggja hagagøtur verður savnað á einum stað, soleiðis at vit tryggja okkum, at vit menna ein fakligan førleika at gera og halda viðlíka góðar hagagøtur. Eisini tryggja vit okkum, at arbeiðið verður lagt til rættis eftir einum skipaðum leisti um alt landið.

Samanumtikið

Føroyar er eitt fjarskotið land hjá teimum flestu at vitja, Føroyar er eisini eitt lutfalsliga dýrt land at vitja. Vit hava avmarkaðan kapasitet, bæði tá tað snýr seg um gisting, flutning og aðrar hentleikar. Vit kappast við okkara grannalond um kundar, sum ynskja at ganga fjallatúrar á okkara breiddarstigi. Tað eru aloftast náttúrutilvitað ferðafólk, sum vitja Føroyar; fólk, sum ynskja at gera tað rætta og uppliva okkara fantastisku náttúru uttan at kenna seg sum ein meinbogi. Tað er framhaldandi hesi ferðafólk, vit skulu fara eftir og tað er okkara sannføring, at hetta lógaruppskotið hevur við sær, at vit fara frá eini óskipaðari ferðavinnu við tilvildarligum loysnum úti í náttúruni til meiri skipað viðurskifti, við greiðari treytum og avmarkingum, sum eru munandi lættari at greiða fólki frá.

Tað er altavgerandi at ferðavinnan fær neyðugu vinnuligu karmarnar at virka undir og at ein skipan verður sett í verk, sum tryggjar støðug og rímilig viðurskifti, hvat atgongd til náttúruna viðvíkur. Tað tryggjar hetta lógaruppskotið og tí tekur Visit Faroe Islands undir við uppskotinum til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu.